

Sjúrður Skaale

# Kristindómur skal vera fyri øll

Fólkaskúlalógin javnsetir prestar og lærarar. Hon virðir ikki tann átrúnaðarliga pluralitetin í samfelagnum. Og sambært lógini er ikki undirvísingarskylda í kristni. Er hetta í lagi?

Spurningurin um hvørja støðu religión skal hava í skúlunum, hevur í mong ár elvt til stórt kjak um allan heimin.

Úr einum filosofiskum sjónarhorni verður tosað um markið millum vitan og trúgv. Við støði í pedagogikki og mannarættindum verður bæði tosað um at verja børn móti indoktrinering, og at tryggja rættin hjá minnilutum. Úr einum mentanarligum sjónarhorni verður tosað um siðvenju. Og úr einum sosiologiskum sjónarhorni verður tosað um vandan fyri, at samfeløg detta sundur, um øll ikki fáa somu undirvísing.

Í fleiri londum londum – serliga í USA – eru sterkir bólkar, sum seta menningarlæruna undir trýst, og vilja hava teoriiina um "Intelligent Design" (ID) heilt ella lutvíst setta í staðin í skúlunum.

Hetta stríð hevur í USA havt við sær rættarmál, har dómarar hava gjørt greitt, at undirvísingin í almennum skúlum skal byggja á vitan; ikki á trúgv. Men kjakið er ikki tagnað av teirri orsøk, m.a. tí tað er sera trupult - fyri ikki at siga ómøguligt - at siga, hvar markið millum vitan og trúgv skal setast.

Í Europa endaði kjakið um religión í skúlunum tann 3. november í fjør í Mannarættindadómstólinum í Strasbourg, tá ein dómur varð sagdur, sum síðani er vorðin snúningsdepil kjakinum: Dómurin gjørdi greitt, at smáir krossar – crucifix – ikki skulu hanga í skúlastovum í Italia.

Sambært dóminum er krossurin eitt katólskt súmbol. Slík súmbol hoyra ikki heima í almennum fólkaskúlum, tí almenna skúlaverkið skal tryggja næmingunum neutrala og objektiva frálæru, sum byggir á vitan. Skúlaverkið skal ikki evangelisera; skúlaverkið ikki boða nakra trúgv.

## Kristindómurin er karmurin

Dómurin í Strasbourg var alt, alt ov kategoriskur.

Skúlin skal sjálvandi stremba eftir at geva børnunum eina læru, sum er neutral, objektiv og grundað á vitan. Hinvegin er tað bæði náttúrligt og neyðugt, at skúlaskipanin byggir á og endurspeglar ta siðvenju og ta mentan, sum hon virkar í. Og mentanin í vesturheiminum byggir í sera stóran mun á kristindóm. Bara í verkunum hjá Shakespeare eru til dømis 1300 tilsipingar til bíbilskar tekstir. Tað má síggjast aftur í skúlanum.

Føroyska fólkaskúlalógin sigur, at skúlin skal geva næmingunum eina "kristna og siðalagsliga uppaling". Harumframt er siður í føroyska fólkaskúlanum, at hava morgunsang áðrenn undirvísingin byrjar. Tá vit hava í huga føroyska siðsøgu, munnu tey flestu halda, at hetta fellur hetta røttu megin tað, sum er rætt og rímiligt.

At "kristnikunnleiki" er ein lærugrein í skúlanum, er eisini náttúrligt. Kristindómurin hevur í øldir verið tann avgerandi fatanarkringurin. Tað sæst eisini aftur í okkara dagligu talu. Hvønn dag, í øllum viðurskiftum, brúka vit myndir úr Bíbliuni í okkara dagligu talu. Vit taka til at "Tað er sum Dávid móti Goliath", "hann hevur eitt Jobs tol", "tað er sum at kasta perlur fyri svín" o.m.a.

Nógvir av okkara siðum stava frá kristindóminum, okkara álmanakki byggir á kristindómin, og bæði tilvitað og ótilvitað eru okkara hugsanir grundaðar á somu læru.

Tí eigur kristni sjálvandi at vera ein partur av undirvísingini fólkaskúlanum, sum skal geva okkara børnum "alment dannilsi". Skulu vit skilja hvørji vit sjálv eru, er vitan um kristindóm líka týdningarmikil sum vitan um søgu.

Á sama hátt sum tað krevur vitan um islam at skilja Miðeystur, krevst vitan um kristindóm fyri at skilja vesturheimin.

## Ein javnvág skal finnast

Spurningurin er so, hvussu hetta skal gerast í skúlanum.

Og her hava vit ikki altíð verið so heppin í Føroyum. Í staðin fyri at gera "kristnikunnleika" til eina inkluderandi lærugrein, er hon gjørd ekskluderandi.

Ein ávís fatan av kristindóminum varð í farnu øld politiskt vald út sum tann "rætta". Hetta hevði m.a. við sær, at fólk, sum hoyrdu til Brøðrasamkomuna, ikki sluppu at undirvísa. Tey ráðandi viðurkendu ikki tann pluralitet, sum við Brøðrasamkomuni var komin í samfelagnum.

"Berufsverboot" er eitt ógvusligt orð - men sannleikin er tíverri, at politikkurin bar á tað borðið: Fólk, sum høvdu eina ávísa religiøsa sannføring, sluppu ikki at útinna eitt ávíst borgarligt, alment starv.

Inntil fyri einum 25 áru síðani var eisini vanligt, at børn, hvørs foreldur hoyrdu til Brøðra- ella Hvítusunnusamkomuna fóru út, tá undirvíst varð í kristnikunnleika.

Kósin var altso ekskluderandi.

## Framvegis eksklusión

Hóast mangt er broytt, er kósin framvegis ekskluderandi, juridiskt sæð.

Í fyrsta lagi krevur fólkaskúlalógin, at undirvísingin í kristni skal samsvara við fólkakirkjunnar evangelisk-luthersku læru.

Í øðrum lagi kunnu foreldur, sum hoyra til fólkakirkjuna, lata ein prest átaka sær skúlans uppgávu í hesum faki.

Í triðja lagi kunnu foreldur, sum hoyra til eina fríkirkju, lata sítt trúarsamfelag átaka sær skúlans uppgávu í kristni.

Í fjórða lagi kunnu foreldur, sum ikki hoyra til fólkakirkjuna, heilt sleppa sínum børnum undan at læra um kristindómin.

Lagt verður sostatt upp til, at kristnikunnleiki ikki bara snýr seg um frálæru um kristindómin, men at tað eisini verður prædikað - í samsvari við læruna hjá fólkakirkjuni. Vissuliga er markið millum frálæru og prædiku trupult at seta - men her verður tað tikið heilt burtur. Lógin ásetir, at undirvísingin skal samsvara við læruna hjá eini ávísari kirkju, og hon javnsetir prestar og prædikumenn við lærarar í skúlanum.

Vit hava trúarfrælsi í landinum, og við hesum ásetingum ber ikki til at krevja, at øll foreldur lata síni børn ganga til kristni í skúlanum. Tað er sjálvsagt orsøkin til, at kristni - sum tann einasta lærugreinin - kann veljast frá. Líka so lítið sum nakar kann tvingast at senda síni børn í sunnudagsskúla, kann nakar tvingast at senda síni børn til kristni í skúlanum, um henda undirvísing kann javnsetast við ein sunnudagsskúla.

## Ymisk signal

Onkur vil siga, at at hetta er ógvuliga akademiskt, og at tað als ikki er nakar trupulleiki í veruleikanum.

Fyrrverandi formaður Lærarafelagsins, Magnus Tausen, hevur í útvarpssending sagt, at í lærugreinini kristni skal skúlin geva børnunum *kunnleika um kristindómin – men skúlin skal ikki prædika*.

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, hevur ført somu sjónarmið fram.

Tað er gott, at politiski myndugleikin og Lærarafelagið hava henda hugburð. Og tað er eingin ivi um, at tað eisini er hetta, sum í flestu førum verður gjørt.

Men allir lærarar gera ikki tað sama - og allir politikarar meina heldur ikki tað sama. T.d. dylur Miðflokkurin ikki fyri, at í skúlanum skal trúgv koma fyrst - og vitan aftaná.

Tí eiga vit í løggávuni at senda eitt greitt signal um, hvat vit vilja. Lærarar eiga ikki at fáa ymisk boð um, hvat myndugleikarnir halda at teir *eiga* at gera, og hvat lógin sigur, at teir kunnu gera.

Vit hava flutt okkum langt rætta vegin síðani fólk úr Brøðrasamkomuni ikki sluppu at undirvísa.

Nú eiga vit í fyrsta lagi formliga at viðurkenna tann pluralitet, sum á hesum øki er í samfelagnum: Tey flestu hoyra til fólkakirkjuna, men nøkur eru eisini ateistar, nøkur hoyra til Brøðrasamkomuna og onnur til Hvítusunnusamkomuna. Skúlin skal læra øll hesi um kristindómin. Skúlin eigur prinsipielt at vera inkluderandi og savnandi, heldur enn ekskluderandi og spjaðandi.

Vit eiga í lógini at finna eina javnvág, har vit øðrumegin virða mentan og siðaarv og hinumegin lata objektivitet og vitan verða teir varðar, vit ganga eftir.

Eg eri greiður um, at eitt kjak sum hetta skjótt kann verða misbrúkt av ávísum kreftum í eini roynd at stigmatisera fólk og flokkar. Men hetta eru spurningar, sum verða viðgjørdir um allan heimin, og vit eiga eisini opið at kunna kjakast um, hvørja kós vit vilja halda. Tí havi eg tikið spurningin upp til orðaskiftis á tingi.

Fírmakappingin

Firmakappingin á Rás2 verður skipað í fimm lokaløki. **Suðurøkið** (Suðuroy og Sandoy), **Vesturøkið** (Kvívík, Leynar, Vestmanna og Vágar), **Høvuðsstaðarøkið** (Kollafjørður, Hoyvík, Tórshavn, Argir og Nólsoy), **Eysturøkið** (Sundalagið og Eysturoy) og **Norðurøkið** (Norðoyggjar).

**Tilmelding:**
firmakapping@ras2.fo

*Kostnaður fyri luttøku er kr. 500,- við MVG*

Besta fyritøkan vinnur eina ferð við Norrønu fyri 20 fólk

Rás2 títt radio